# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samanhald og styrki

Finalan um løgmanssteypið 2007 gjørdist søgulig fyri føroyskan fótbólt. Tað var hon longu undan dystinum hjá EB/Streymi, sum fyri fyrstu ferð var partur av finaluni, og við sigrinum skrivaðu teir seg inn í føroysku fótbóltssøgubøkurnar sum eitt av liðunum, ið veruliga hava rokkið tindinum. Og at breiddin í oddinum soleiðis gerst størri, er væl nakað, sum allar fótbóltsføroyar munnu fegnast um. Og tað er eitt bragd í sjálvum sær. Eitt bragd, sum ikki gerst minni, tá hugsað verður um, hvussu ungt felag EB/Streymur í veruleikanum. Ásannandi at hvørki EB ella Streymur hvør í sínum lagi høvdu stórvegis møguleika at gera seg galdandi í føroyskum fótbólti, kastaðu feløgini fyri 15 árum saman.
Dømini um miseydnaðar samanleggingar innan bæði ítrótt, vinnulív og samfelagið annars eru mong, men EB/Streymur telist so avgjørt ikki millum hesar. Ivaleyst eru orsøkirar fleiri, men ein tann størsta man tó vera, hvussu væl tað hevur eydnast at tæða lokalsamfelagið kring samanleggingina. Úr Kollafirði til Eiðis fær felagið treytaleysan stuðul frá bygdafólkinum, og júst hetta er nakað heilt serligt, um hugsað verður um samanleggingar. At felagið so eisini hevur havt hepna hond í menning síni av spælarum, nakrar evnaríkar spælarar, dugnaligar venjarar og eina hepna hond við at leita sær styrk uttaneftir, eru aðrir lutir. Men uttan tað samanhaldið, sum varð skapt frá fyrsta degi, vildu aðrir lutir ikki borið til. Og tá vit senda eitt hjartaligt tillukku til EB/Streym, er tað ikki minst ein heiðran til hetta samanhald.
Og so prógvaði finalan í gjár, at tað var ein skilagóð avgerð at flyta dystin av Tórsvølli og á ovara vøll í Gundadali. Hvussu víkir og vendir við tignini annars, so er tað ein veruleiki, at føroyskir spælarar hvønn dag spæla á graslíki. Og tí var tað nærum óskiljandi, at kanska mest týðandi dysturin á árinum skuldi spælast á einum púrasta ókendum undirlag.
Hinvegin eigur FSF ikki heilt so nógvar rósur uppiborið fyri vantandi leikskránna til dystin. Tað tekur í øllum førum nakað av hátíðardáminum, tá áskoðarar skulu rinda 100 kr. fyri at síggja dystin, og ikki fáa somikið sum ein faldara við nøvnunum á spælarunum á liðunum báðum.

**Sosialurin**

## Eitt bispaval virðiligt fyri eina frælsa fólkakirkju!

**BERGUR JACOBSEN**



Í ólavssøkuprædiku míni í Christianskirken á Christianshavn loyvdi eg mær m.a. at siga..” valið av nýggjum biskuppi verður minst líka so týðandi fyri framtíðina hjá Føroysku Kirkjuni, sum júst framda yvirtøkan”. Og tey orðini standi eg við.

Tá bispaval er í Danmark, so fer orðaskifti fram alment, og valevnini noyðast eisini at dystast í fjølmiðlunum og á veljarafundum, fyri at greiða fólki frá, hvat teirra ætlanir eru fyri framtíðina hjá kirkjuni og kristindóminum, og hvørja guðfrøðiliga støðu valevnini hava í heilatikið ella í samband við ávís mál. Tá eitt av valevnunum so hevur vunnið valið, verður tað góðtikið, og lívið í biskupsdøminum heldur fram. Í einum valdysti vera tað tey, ið vinna og tey, ið ikki vinna.

Í nýggjari tíð hava tað higartil verið tríggir biskuppar í Føroysku kirkjuni (í lutherskum høpi er ongin munur á einum varabiskuppi og einum biskuppi), og ongantíð hevur verið talan um val, ella nakað valkjak. Tað er líkasum bara hent – onkur vil siga gjøgnum bakdyrnar!

Sum skilst er óførur aktivitetur í løtuni fyri at fáa valevnini uppá pláss, og fólk hava savnað undirskriftir. Nú er tað eitt rættuliga taknemligt arbeiði at savna undirskriftir í Føroyum, tí føroyingar eru so fittir og skriva undir uppá hvat sum helst. Um tú bað fólk um at skriva undir uppá at mánin er størri enn sólin, so høvdu tey flestu helst gjørt tað. Og tað ræður um at verða fyrstur at savna stillarar, tí so kenna undirskrivararnir seg bundnar av undirskriftini, longu áðrenn teir hava fingið nakað at vita um, hvørjar áskoðanir valevnini hava, ella hvørjar hugsjónir teirra eru fyri framtíðina hjá kirkjuni. Hendan gongdin er øvugt!

Fólkakirkjan er, mótvegis øðrum kristnum trúðarbólkum, ein opin stovnur. Opin orðaskifti eru kanska eitt sindur fremmand í Føroyum - ikki minst tá tað snýr seg um átrúnaðarlig viðurskifti. Allar ósemjur skulu fjalast ”fyri friðin skyld”. Fasadan skal vera í lagi.

Men, við at renna undan opnum orðskiftum, so kann tað lættliga henda, at tað vera tey ósmædnu, tey freku og tey, sum hugsa minst, ið taka avgerðirnar og fáa valdið. Opinleiki og siðiligheit eru grundvøllurin undir einum framkomnum nútíðarsamfelag. Eg eri tíverri bangin fyri, at á hesum økinum eru Føroyar eitt sindur av einum u-landi.

Nú hava føroyingar so fingið sína egnu fólkakirkju, við eini skipan, sum í høvuðsheitunum líkist teirri donsku. So er bara at vóna, at føroyska kirkjan eisini tekur við læru av tí besta við donsku kirkjuni. Millum annað opinleikanum - eisini í samband við bispaval!

Tí eiga prestar og kirkjuráðslimir, ja, allir føroyskir fólkakirkjulimir at krevja at talan verður um ein opnan valdyst, at øll valevnini skulu leggja fram hugsjónir sínar í fjølmiðlunum, og at opnir valfundir verða hildnir, har kirkjufólkið fær loyvi til at seta valevnunum spurningar.

Tástaðni hava føroyingar veruliga fingið sína egnu fólkakirkju! Hettar ljóðar kannska eitt sindur fremmant – men huldufólk eiga ikki at hava nakran leiklut í eini fólkakirkju.

Tað er helst eitt aðalmerki fyri kristindómin, at Jesus doyði alment, ikki bara fyri øllum, men eisini fyri allara mann ásjón, og tí tolir alt kirkjuligt og guðfrøðiligt orðskakifti dagsins ljós.

Í fornkirkjuni er var talan um Messianska loyndardómin, at tiga um hvør, ið Jesus veruliga var, tí at lívsvandi stóðst av at prædika kristindómin. Hetta er kortini ongin fyrimynd fyri dagin í dag, har tað – í hvussu so er í Føroyum – nærmast stendst lívsvandi av ikki at taka undir við kristna boðskapinum.

Javnaðarflokkurin:

## Skattalættar til hálønt og “vælferðarsamfelagið”

INGRID S. HENRIKSEN
limur í Suðurstremoyar Javnaðarfelag. og limur í landsnevndini hjá Javnaðarflokkinum



Búskaparfrøðingurin Magni Laksafoss hevur seinnu árini víst á, at landsbúskapurin er yvirupphitaður og hevur í hesum sambandi til fánýtis síðan 2005 mælt frá geva óneyðugar skatta-lættar. Magni Laksafoss, ið nú er landsstýrismaður í fíggjarmálum, mælir til, at tálmandi tiltøk verða sett í verk í sambandi við fíggjarlógina fyri 2008 – tiltøk, ið fara at hava við sær, at ferðin á búskapinum minkar. Samgonguflokkarnir hava í hesum sambandi beint eftir Ólavsøku 2007 boðað frá, at semja er um at fremja sparingar á øllum samfelagsøkjum – eisini á almanna- og heilsuøkinum. Líkt er til, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm ikki tekur undir við hesum spárileisti og hevur alment sagt um samantvinningina millum yvirupphitingina av landsbúskapinum, samtykta skattalættan 2008 og sparingar á almannaøkinum: “Sparingar? Forget it!”

Javnaðarflokkurin eigur ikki at vera við at fremja sparingar á almanna- og heilsuøkinum, men eigur flokkurin hinvegin at leggja doyðin á at hækka og betra vælferðarveitingar og -øki, ið eru afturúrsigld. Javnaðarflokkurin eigur heldur at leggja upp til at lata almanna- og heilsuøkinum meiri pening, soleiðis at alneyðug vælferðarátøk kunnu fremjast, ið hava ligið á láni í fleiri ár. Nógv dømi kunnu verða nevnd um vælferðarveitingar og -øki, sum eru sjálvsøgd í Danmark og hinum skandinavisku londunum, ið eru afturúrsigld í Føroyum. T.d. kann verða nevnt, at fyritíðarpensjónin til lægstu og miðal fyritíðarpensjónistar er nógv lægri í Føroyum enn í Danmark. At vit onga skipan hava í Føroyum um ókeypis endurvenjing/rehabilitering fyri fólk, sum av sjúku ella breki hava brúk fyri uppvenjing eftir útskrivan frá sjúkrahúsi. Og at einsamallir uppihaldarar fáa ikki ta hjálp og tann stuðul, sum hesir fáa t.d. í Danmark. Í hesum høpi skal verða nevnt, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur lovað, at lægsta fyritíðarpensjón skal hækkast upp til miðal fyri tíðarpensjónsstøði komandi tvey árini, t.v.s. í 2008 og í 2009, og má peningur tískil setast av

Framhald á síðu 32

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.